Ísraelsbók

– Sjálvt um orðini eru 31 ára gomul, er innihaldið eins aktuelt í dag, sigur Dánjal Poulsen. Hann hevur tikið stig til at fáa tað, Petur W. Háberg undirvísti um Ísrael í Ebenezer í 1968, á prent.

Frants Jensen

Týsdagin kom bókin »Ísrael – land lyftisins og vit« út. Sjálvt um Petur W. Háberg doyði fyri 15 árum síðani, so eru tað hansara orð, sum nú verða givin út.

Innihaldið í bókini eru seks fyrilestrar, sum Petur Háberg hevði í bíbliuflokkinum í Ebenezer í Havn í 1968. Dánjal Poulsen festi hesar fyrilestrarnar á fýra-sporaðan bandupptakara.

– Eg meti innihaldið í hesum fyrilestrunum um Ísrael var so áhugavert, at eftirtíðin eisini eigur at kenna til tað. Tí avgjørdu vit at fáa tað á prent, og Finnbjørn Nielsen hevur lurtað øll bondini ígjøgnum og skrivað tekstin inn, sigur Dánjal Poulsen.

Teir seks fyrilestrarnir í bókini geva eitt stutt yvirlit yvir søgu jødanna heilt fram til okkara dagar. Tað byrjar við Ábrahami, søguna frá Gamla Testamenti, Jesu tíð, tíðina jødafólkið hevur verið í útlegd, burtur frá teirra egna landi, tá Ísrael verður stovnað aftur í 1948, nútíðin og eisini hvat profetiini siga um framtíðina.

– Fyrilestrarnir vórðu hildnir árið eftir seksdaga-kríggið, og var evnið tí eisini sera aktuelt. Sjálvur bergtók Petur áhoyrarnar við sínum meistarliga frásøguhátti. Hann granskaði eisini Guds orð dúgliga og hevði ein serligan alsk til Ísrael og jødarnar, útvalda fólk Guds.

– Tað, sum Petur leggur dent á í bókini er, at vit sum 3. persónur ikki bara lurta eftir ella lesa um evnið Ísrael, men at vit sum einstaklingar, ella vit umboðandi allar heimsins tjóðir, ikki sleppa undan at taka støðu viðvíkjandi Ísrael. Tað ber ikki til at vera uttanveltaður, sigur Dánjal.

Lítið av Ísraelsbókum

Sjálvur var Petur bara einaferð í Ísrael. Tað var, tá ið hann og Adrian Johansen í 1973 vóru ferðaleiðarar fyri einum 44 persónar stórum bólki. Petur gjørdist sjúkur stutt aftaná, og Svenning av Lofti byrjaði sum ferðaleiðari, og heldur hann á enn í dag.

Bókin »Ísrael – land lyftisins og vit« kemur út í sama mánaði, sum Petur hevði havt sín 85 ára føðingardag, 31. august. Konan Hjørdis er í dag 83 ár, og hon hevur tikið stig til at endurútgeva bókina »Hugsa um framtíð tína«, sum maðurin umsetti í 1971.

Tað er Forlagið Leirkerið í Gøtu, sum gevur út bøkurnar.

– Vit leggja dent á at geva út bøkur við kristnum innihaldi. Næstan ongar bøkur eru um Ísrael á føroyskum – í øllum førum ikki bøkur, sum lýsa nútíðarsøguna í einum bíbilskum ljósi. Tí eru vit sera glaðir um at fáa hesa bókina út, sigur Zacharias Zachariassen, trúboðari, sum eisini er við at reka forlagið.

Bókin er 152 blaðsíður til støddar og kostar 250 krónur. Tó fáa teir 650 limirnir í bókaringinum hjá forlagnum hana fyri 200 krónur.

Stórur áhugi fyri oljuframsýningini

Oljuframsýningin »Offshore Europe 99«, sum verður í Aberdeen frá 7. til 10 september hevur eisini føroyskan áhuga. Eini 100 fólk úr Føroyum vera í Aberdeen hesar dagarnar

Leif Laadal

Stóra altjóða oljuframsýningin »Offshore Europe«, sum verður hildin annað hvørt ár, verður í Aberdeen frá 7. til 10. september. Ongantíð hevur áhugin fyri hesi framsýning verið so stórur í Føroyum, sum hann er júst nú. Rutuflogfarið hjá Atlantic mánakvøldið 6. september til Skotlands er longu útselt og Faroe Travel skipar harafturat fyri einum leigutúri týsmorgunin 7. september. Fast rutusamband er aftur til Føroya fríggjadagin 10. september, meðan leiguflogfarið er aftur í Føroyum leygarmorgunin 11. september.

Øll ferðafólkini í tí fyrra flogfarinum fara ikki á oljuframsýning, men tað verður mett, at eini 100 føroyingar fara til Skotlands í sambandi við framsýningina.

Fyri tvemum árum síðani vitjaðu 25.000 fólk frá 70 londum framsýningina. Tá vóru 1800 básar og útstillarar av ymiskum slag. Hesi komu úr 23 londum. Mett verður, at framsýningin í ár verður eins stór og fyri tveimum árum síðani.



Tey stóru oljufeløgini gera nógv burturúr framsýningini »Offshore Europe 99«. Soleiðis ætlar ELF, at básur teirra skal síggja út í Aberdeen í næsta mánað

Umhvørvisfundur uppi á Slættaratindi

Um viðrar verður fólkafundur sunnudagin uppi á Slættaratindi, hægsta fjalli í Føroyum

Randi Jacobsen

Summarið er farið at halla, og nógvir heitir dagar verða neyvan aftrat á fjøllunum í ár. Komandi vikuskifti verða nógvar útferðir gjørdar. Um viðrar sunnudagin, bjóða eiðisfólk, sum búgva í Føroya best røktu bygd, fólki niðan á hægsta fjall okkara, Slættaratind, til fólkafund.

Eiðisbygd varð í 1997 kosin nr. 2 í kappingini um Føroya best røktu bygd, og í ár fekk Eiði fyrsta plássið í kappingini. Við í ferðalagnum niðan á Slættaratindi verða Anfinn Kallsberg, løgmaður, Høgni Hoydal, varaløgmaður og Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna.

Umhvørvið, náttúran og føðilandið verða høvuðsevnini á fundinum, nú vit standa á gáttini til eina nýggja øld. Hvussu hava vit føroyingar higartil megnað at hildið náttúru okkara reina? Og hvat kunnu vit gera fyri at hetta land, sum vit kanska sjálvi skjótt fara at hava fult vald yvir, í framtíðini verður varðveitt í reinleika og fagurleika?

At standa á hægsta fjalli okkara og líta yvir Føroyaland – tann kenslan kann illa lýsast í orðum og er ymisk frá einum persóni til annan, og tískil má hvør einstakur uppliva løtuna og goyma hana í huga sínum. Sum minni um henda fólkafund á Slættaratindi hava fyrireikararnir latið eitt skjal prenta, sum hvør einstakur keypir, áðrenn farið verður niðan á tindin. Hetta skjal verður ovast á tindinum undirskrivað av Anfinni Kallsberg, løgmanni, sum eisini gongur á odda saman við høvuðsferðaleiðaranum á túrinum, Jógvani í Løðuni.

Av tí at skiftandi veðurlag okkara ofta hevur við sær, at ikki altíð er klárt á hægsta tindi okkara, er trupult at seta ein fastan dag fyri fundin, men fyrireikararnir miða ímóti at hava fundin nú sunnudagin kl. 15. Viðrar ikki, kunnu broytingar verða gjørdar, og tað verður so kunngjørt.

Tað er ein fyrimunur, um fólk, sum ætla sær við, boða Eystroyar Kunningarstovu frá.

Dimmalætting á Interneti
ADR.: www.dimma.fo
Lesið tíðindi á Interneti
– dag sum nátt –
HVØNN DAG

Hevur tú eina góða søgu?

Dimmalætting hevur fleiri heimildarfólk kring landið, sum fegin taka ímóti tipsum frá lesarunum. Hevur tú eina góða søgu, sum onnur áttu at fingið kunnleika til? Hevur tú hugsanir um okkurt, sum átti at komið fram? Ella ert tú sjálv(ur) í ferð við okkurt spennandi?

So hevur tú møguleika at venda tær til eitt av heimildarfólkum okkara. Tey eru hesi

Vágoy: Jákup Suni Lauritsen, Sørvág. Tlf. 333433
Eysturoy: Jón Magnus Joensen, Strendur Tlf. 449104
Joannes S. Hansen, Saltangará Tlf. 447864
Suðuroy: Sigmundur Olsen, Porkeri Tlf. 373921 - Bergur Storhamar, Trongisv. Tlf. 371795
Norðoyggjar: Anita Kotlum Petersen, Viðareiði. Tlf. 451054
Dánjal Klakk, Klaksvík Tlf. 455013
Sandoy: Ingun Simonsen, Skopun. Tlf. 361782

Nýggjur føroyskur pengaseðil

Arbeiðið við at framleiða teir nýggju føroysku pengaseðlarnar gongur sína stillisligu gongd. Eftir ætlan skulu fimm nýggir seðlar verða lidnir um tvey ár. Nýggjur føroyskur 200-krónur seðil verður tá til taks

Leif Laadal

Danski tjóðbankin er byrjaður at geva út nýggjar pengaseðlar. Teir gomlu vóru ikki tíðarhóskandi longur. Serliga vóru tað trupulleikar við privatari kopiering, sum gjørdi, at avgerð bleiv tikin um, at allir seðlarnir skuldi skiftast út.

Í Føroyum brúka vit enn teir gomlu føroysku seðlarnar, men avgerð er eisini tikin her á landi um útskifting av verandi seðlum. Eftir ætlan skulu teir fýra føroysku seðlarnir skiftast út tey næstu tvey árini, og harafturat verður ein spildurnýggjur seðil prentaður. Hesin seðil fer at verða áljóðandi 200 krónur eins og tann danski.

Zakarias Heinesen teknar

Tey seinastu mongu árini hevur Ingolvur av Reyni verið listamaður, tá ið føroyskir pengaseðlar hava verið gjørdir. Fíggjarmálastýrið samskipar tað arbeiðið, sum verður gjørt í sambandi við teir nýggju føroysku pengaseðlarnar, og stýrið heitti eisini á Ingolv hesaferð. Ingolvur bar seg undan, og tí varð heitt á Zakarias Heinesen. Hesin játtaði og er nú farin undir tað stórarbeiðið, sum tað er at vera listamaður á eini pengaútgávu.

Tað er danski tjóðbankin, sum ger sjálvar formarnar til føroysku pengaseðlarnar. Ein partur av hesum arbeiði verður gjørt á teldu, men tað verður eisini arbeitt við meiri handføstum evnum.

Jóngerð Purkhús, sum er fulltrúi á Fíggjarmálastýrinum, sigur, at arbeiðið við teimum nýggju føroysku pengaseðlunum gongur eftir ætlan. Ein av limunum í ráðgevandi nevndini, sum var í Føroyum og vitjaði í síðstu viku, arbeiðir í tjóðbankanum, og hann kunnaði Fíggjarmálastýrið um arbeiðið við teimum nýggju føroysku pengaseðlunum. Sambært honum, so verða allir fimm seðlar klárir til prentingar um eitt til tvey ár.

Danir skifta um nakrar dagar út gamla 100-krónur seðil sín. Tónaskaldið Carl Nielsen prýðir nýggja seðilin. Føroysku seðlarnir verða einsini skiftir út í næstum, og tá kemur eisini ein nýggjur føroyskur 200-krónur seðil

Helena fær skolu

– Eg haldi, at full semja er í býráðnum um harðliga at átala mannagongdina hjá landsstýriskvinnuni við almanna- og heilsumálum, sum ikki fylgdi innstillingini til læknastarvið, sigur Leivur Hansen, býráðsformaður í Havn

Randi Jacobsen

Á býráðsfundi í kvøld fer Tórshavnar býráð at viðgera málið um setanina av 8. kommunulæknanum í Suðurstreymoyar læknadømi.

Áttandi læknin er settur, og býráðið væntar ikki og fer neyvan heldur at krevja, at tann avgerðin verður broytt.

Men tað er mannagongdina hjá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu við almanna- og heilsumálum, sum býráðið í kvøld fer at gera sínar viðmerkingar til.

Tórshavnar býráð og Nólsoyar bygdarráð innstillaðu Jens Andreasen.

Men Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna við almenna- og heilsumálum, fylgdi ikki innstillingunum hjá kommununum og setti Turid Petersen, kommunulækna í Kollafirði í starvið. Ein grundgeving fyri hesa avgerð var javnstøðulógin.

Kommunurnar fingu at vita, at hetta fór at verða seinastu ferð, at tær skuldu innstilla, tí nú fór nýggja kommunulæknaráðið at hava ta uppgávuna.

Leivur Hansen, býráðsformaður í Havn, heldur tað vera løgið, at almanna- og heilsumálastýrið samstundis sum kommunurnar innstillaðu eisini bað kommunulæknaráðið koma við eini tilráðing, og hann heldur treytirnar, sum kommunulæknaráðið setir fyri nýggjar kommunulæknar í Havn, vera heilt burturvið. Ein treytin var, at læknar, sum hava virkað sum kommunulæknar á bygd, skulu hava fyrimun at fáa kommunulæknastarv í Havn. Tað heldur Leivur Hansen vera umvenda diskriminering.

– Hatta er eitt krav, men tað telur ikki við, at læknin er fryntligur og dugir væl við fólki, sigur Leivur Hansen, sum heldur, at ráðið kundi gjørt uppskot til krøv, sum so onkur hægri myndugleiki kundi viðgjørt.

– Eg haldi, at full semja er í býráðnum um, at býráðið harðliga skal átala mannagongdina hjá landsstýriskvinnuni í almanna- og heilsumálum. Landsstýrið hevur annars altíð fylgt innstillingunum, sigur býráðsformaðurin.